# Hvørt til sína tíð



Um tað almenna ikki setti partapening í Atlantic Airways í december 1992, var kanska onki føroyskt flogfelag til í dag, heldur stjórin á Ferðaráðnum

**Almennur stuðul er ikki altíð bara av tí ringa, sigur stjórin á Ferðaráðnum. Hann vísir til, at bæði Atlantsflog og Smyril Line hava fingið almennan stuðul. Og um ikki so var, er ivasamt, um hesi feløgini í dag høvdu verið til. Men politikararnir skulu ansa eftir ikki at »grípa inn í tíð og ótíð«, sum hann tekur til**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tað er í lagi, at tað almenna stuðlar eini vinnu, sum av einihvørji orsøk kemur í trupulleikar. Men máti skal vera við, sigur stjórin á Ferðaráðnum, Heri Niclasen.

–Sjálvandi skal tað almenna ikki grípa inn í tíð og ótíð. Men tað vil altíð koma fyri í tí veruliga lívinum, at stór samfelagsbúskaparlig virði standa uppá spæl, og tá skal ein vera serliga varin. Tá nyttar lítið at blaka um seg við politiskum stevnuskráum og lærubókscitatum. Tá er tað gott, at tað úr rúgvuni stinga seg upp nakrir úrmælingar, sum uttan atlit til egnu politisku áskoðanir ella egnan vinning gera sína ávirkan galdandi. Eisini um hetta gongur beint ímóti tí, sum búskaparfrøðingar meta vera rætt, sigur Heri Niclasen.

Hann vísir á, at mong dømi eru um hetta. Bæði her heima hjá okkum sjálvum og aðrastaðni. Hugsað bert um nøkur av minningarorðunum sum fyrrverandi løgmaður okkara, Atli Dam sáli, fekk frá fleiri av okkara fremstu vinnulívsmonnum, sigur hann.

Hann vísir á, at um tað almenna ikki hjálpti Smyril Line á heysti 1984, var tann fyritøkan farin á heysin.

Og um tað almenna ikki setti partapening í Atlantic Airways í december 1992, var kanska onki føroyskt flogfelag til í dag, heldur hann.

Hann fegnast um ta loysn, ið gjørdist endin á trupulleikunum, sum Smyril Line seinastu tíðina hevur verið í.

–Hatta dámar mær væl, sigur hann. Tað vóru annars ógvuliga døpur, og oftani diffus, signal, sum hava verið at frætt í fjølmiðlunum frá einaferð í heyst og til fyri stuttum. Mær dámdi als ikki framtíðarætlanirnar, soleiðis sum tær vórðu lagdar fram tá. Nú sær tað í hvussu so er ørðvísi út. Tað er av største týdningi fyri ferðavinnuna, at vit eisini hava eitt gott sjóvegis samband, og tí vóni eg, at teir skjótt fáa ta neyðugu jávnvágina í raksturin. Tað verður tungt, men tað er gjørt fyrr við hepnari hond við gomlu Norrönu, og kann gerast aftur.

## Danskt fordømi

Tá talað verður um bjarging av reiðaríum, hava vit eisini okkurt fordømi í Danmark, vísir Heri Niclasen á.

Eitt misseydnað Bahamacruise ævintýr hjá DFDS, sum teir byrjaðu uppá í 1978, var líka við at koppa felagnum í 1983 og hótti við at taka alla J. Lauritzen koncernina við sær í fallinum.

–Uttan at fara í smálutir kann eg nevna, at í táverandi stjórnini hjá Anker Jørgensen, sat ein vinnumálaráðharri, sum æt Erling Jensen. Tá ein serlig DFDS-nevnd vendi sær til hansara við sínum trupulleikum, legðist hann ikki á boðini, men brúkti tey sambond, hann hevði inn í máttmiklu arbeiðaragrunnarnar sum eitt nú Dansk Erhvervsinvestering og Lønmodtagernes Dyrtidsfond, sigur Heri Niclasen.

Hesir grunnar sprændu so mikið av peningi inn í koncernina, at hon hóraði undan. Aftaná fimm ár í ódnarveðri fekst aftur yvirskot á botnlinjuna í 1985. Og tað hevur tað verið síðani, vísir hann á.

–Hetta líkist nógv teimum signalum, sum okkara egni vinnumálaráðharri hevur sent okkara grunnum. Hetta forðaði fyri, at gomlu og heiðurskrýndu fyritøkurnar hjá J. Lauritzen, konsuli, og C. F. Tietgen, etátsráði, fóru av knóranum.

–Í okkara lítla viðbrekna samfelag skalt tú vera ógvuliga varin og ikki alt ov avgjørdur, tá týdningarmikil vinnutól standa og ridla. Vit hava jú ikki so mong at velja ímillum, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya.

---

Hans Pauli Strøm:

## Mammografimálið - ikki leyst og liðugt



- Ikki fyrr enn allir tættir í mammografimálinum, eisini teir atfinningarsomu, er lýstir gjølla, er klárt at gera eina endalig tilráðing um at seta kanningarnar í verk, sigur Hans Pauli Strøm

**- Fyrireikingararbeiðið í mammografimálinum er als ikki liðugt enn. Allir tættir, eisini teir atfinningarsomu, skulu lýsast gjølla, áðrenn kanningarnar eftir ætlan verða settar í verk í Føroyum í 2008, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Heilsumálum**

MAMMOGRAFI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í sambandi við umrøðu av grein í Ugeskrift for læger, har hvassliga verður funnist at mammografikanningum, varð nevnt, at landsstýrismaðurin í Heilsumálum, Hans Pauli Strøm, er sinnaður seta hesar kanningar í verk í Føroyum. Í umrøðuni varð sipað til skriv til frá landsstýrismanninum til Føroya Felag móti Krabbameini, har bert verður nomið við onkra av atfinningunum, sum hava verið at hoyrt.

Í stuttari viðmerking ger landsstýrismaðurin vart við, et hetta ikki merkir, at atfinningarnar ikki verða havdar í huga í fyrireikandi arbeiðinum til at fara undir hesar kanningar í Føroyum.

## Klárt í 2008

- Um hetta málið longu var leyst og liðugt, var í prinsippinum onki til at hindurs fyri taka avgerðina her og nú og seta kanningarnar í verk beinanvegin. Men tað eru framvegis nógvir tættir í hesum málinum, sum skulu lýsast nærri, og tað er millum annað tað vit eru í gongd við í fyrireikandi arbeiðinum, sigur Hans Pauli Strøm.

Landsstýrismaðurin heldur at, at hóast atfinningarnar eiga at vera havdar í huga, skulu vit ansa eftir, at ein grein, sum eitt nú tann í Ugeskrift for læger ikki verður fatað sum einasti sannleikin.

- Sum lið í fyrireikandi arbeiðinum komandi árini heinta vit allatíðina nýggjar upplýsingar inn, sum lýsa bæði fyrimunir og vansar við mammografikanningum. Síðani verður ein fíggjarliga meting gjørd og ikki fyrr enn tá, er klárt at koma við eini endaligari tilráðing, sigur Hans Pauli Strøm, sum miðar ímóti, at hetta arbeiðið verður liðugt í 2008.